# Finna besta brund í Føroyum

Í HESUM DØGUM FERÐAST SÝNSMENN KRING LANDIÐ OG SÝNA SEYÐIR Í YMSU OYGGJUNUM OG YMSU HAGAPØRTUNUM, OG ALT SKAL ENDA VIÐ EINARI FINALU Á BÚNAÐARDEPILINUM Í KOLLAFIRÐI 7. NOVEMBER, HAR FØROYA BESTI BRUNDUR SKAL FINNAST



KAPPING

Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo



Poul Samuelsen kannar ein brund, meðan Mikkjal Holm, Rene Hansen og Torlakkur Hansen, allir seyðamenn úr Heimaruhelvt, hyggja at
Mynd: Leo Poulsen

Tað verður gjørt alsamt meiri og meiri fyri at fáa so góðan seyð í føroysku hagunum sum tilber.

Hugt verður í nógv størri mun eftir, hvussu beinini á brundunum eru og um teir hava góða ull. Hetta er ein broyting frá tí at menn mest gingu upp í, hvussu stórir brundarnir vóru, nú er tað eisini annað, ið telur.

Seinasta fríggjadag vóru sýnsmenn komnir út til Nólsoyar at sýna brundir og veðrar. Vandi sýnsmaðurin, Poul Samuelsen úr Vík var annar, meðan hin er meiri feskur á økinum, Hans Martin Andreasen úr Kvívík.

Sýningin fer fram á tann hátt, at fyrst verður mát tikið av seyðunum, um bringu og lendar, og síðani fer veruliga sýningin fram.

Seyðirnir verða tiknir inn, tveir og tveir, og síðani kanna sýnsmenninir gjølla bein, ull og horn á seyðinum. Teir taka tveir inn í senn, tí tá eru seyðirnir róligari.

-Vit hyggja serliga eftir ullini, beinunum og hornunum, og flestu feilirnir eru at finna í beinunum. Málini eru annars betri her úti í ár enn tey plaga at vera, sigur Poul Samuelsen.

Seyðirnir verða býttir upp í fýra bólkar, triðju, aðru og fyrstu virðisløn, og so úrvalsseyður.

- Skulu seyðirnir flokkast í bestu flokkarnar er eisini neyðugt, at hornini eru góð. Vaksa tey inn í høvdið, verður hann vrakaður beinanvegin, sigur Poul Samuelsen.

### Greiðari reglar

Tað hevur fram til í ár verið eitt sindur tilvildarligt, hvussu sýnað hevur verið. Ongar rættiligar reglur hava verið, og ógvuliga ymiskt hevur verið, hvussu sýnsmenn mettu hornini, og hvussu stóran dent teir løgdu á tey í mun til beinini og ullina.

-Vit hava havt fleiri fundir gjøgnum várið og summarið, og hava hitst javnan fyri at finna ein felags leist at sýna eftir. Og nú hava flestu sýnsmenn samtykt eina felags linju, sigur Poul Samuelsen.

Við á hesum fundum hava verið seyðamenn, bøndir og so eisini djóralækni, og hesir fundir eru endaðir við einari reglugerð, sum sýnt nú verður eftir.

-Fyri at fáa eina úrvalspremiu skulu allar treytir lúkast. Lenda- og bringumálini skulu vera 70 og 17, og síðani skulu bein, ull og horn somuleiðis lúka strongu krøvini, sigur Poul Samuelsen.

Nýggja reglugerðin ger, at seyðirnir nú verða dømdir eins um alt landið, og har sum ivamál hava verið framman undan, eru nú greiðar reglur at ganga eftir.

-Fyrr hevur tað verið soleiðis, at ein seyður kann hava fingið fyrstu virðisløn í einari kommunu, men tá hann so er komin í aðra kommunu verður hann kolldømdur heilt, og tað er hetta, nýggja reglugerðin skal fyribirgja, sigur Poul Samuelsen.

At ójøvn døming soleiðis kundi koma fyri komst av, at tað eru fleiri lið, ið døma, og tá eingin føst reglugerð finst, stóðst eisini ójøvn døming av. Tilsamans er talan um omanfyri 30 sýnsmenn.



Poul Samuelsen úr Vík og Hans Martin Andreasen úr Kvívík vóru sýnsmenn í Nólsoy seinasta fríggjakvøld. Vanliga eru teir tríggir, men hetta kvøldið vóru teir bert tveir
Mynd: Leo Poulsen

### Finala í Kollafirði

Ferðast verður runt um oyggjarnar í ymsu hagunum, og hvør hagi fær tríggjar seyðir við til ta stóru finaluna, sum verður í Kollafirði 7. november.

- Har verða væntandi einir 80 seyðir, sum allir verða sýndir av sjey sýnsmonnum. Tað skal so enda við, at Føroya besti brundur verður valdur, sigur Poul Samuelsen.

Tað er tó ikki vist, at tað kortini verða so mikið sum 80 seyðir við til finaluna, sum ætlað.

- Finalan verður í Kollafirði 7. november, men tað er ikki vist, at sýnsmenninir eru komnir runt alt landið áðrenn tað. Tað eru lutfalsliga fáir sýnsmenn, so eg vænti ikki, at teir náa runt alt landið, áðrenn finalan verður, sigur Poul Samuelsen.

Nýggja reglugerðin hevur eisini ført við sær, at sýnsmenninir rotera í sýningarstøðunum soleiðis, at teir, sum í fleiri ár hava sýnað í sama øki, nú verða fluttir til nýggj øki í landinum. Sýnsmenninir merkja eisini ein vaksandi áhuga millum seyðamenn og hagapartar fyri seyðinum.

- Ja, tað er stórur munur. Nú royna seyðamenn at fáa bestu brundirnar, og harvið eisini bestu lombini til komandi ár. Nú er tað sjálvandi soleiðis, at seyðurin er ójavnur oyggj úr oyggj og haga úr haga. Summir hagar eru betri enn aðrir, og tí vera mátini ójøvn frá haga til haga, men feilirnir kann rættast upp á, teir eru líka yvir alt landið, sigur Poul Samuelsen.

### Veðrar størri týdning

Tað er truplari at gera nakað við vektina, men kortini er tað langt frá ógjørligt.

- Sandoyggin hevur altíð borið orð fyri at hava serliga smáan seyð, men nú hava vit verið har suðui í fleiri ár, og har er tað vorðið munandi betri. Nú hava teir minst líka góðan seyð sum norðanfyri, sigur Poul Samuelsen.

Viðvíkjandi sýningunum kring landið, so skulu seyðirnir, ið fara víðari til finaluna í Kollafirði, helst fáa í minsta lagi fyrstu heiðursløn, tó helst skulu teir vera úrvalsseyðir. Men veðrarnir sleppa eisini upp í part. Sýndir verða bæði tvævetur veðrar og eldri.

- Ja, tað verður tað. Og har mugu setast ógvuliga hørð krøv, tí ein veðrur brundar so ógvuliga nógv meiri enn ein vanligur brundur. Tí kann ein veðrur við fleiri feilum gera stóran skaða, tí hann brundar eini 80 til 90, so tað sigur seg sjálvt, at tað má ansast serliga væl eftir, sigur Poul Samuelsen.

Og tað er stórur munur á einum heystlambi, sum verður slept til brund, tí tað brundar minni enn helvtina, eini 30 til 40.

-Tí hevur tað so nógv størri týdning, at veðrarnir, ið verða nýttir til brundar, ongar feilir hava, sigur Poul Samuelsen, sýnsmaður úr Vík.

Sýningin gav einum heystlambi úr Heimaruhelvt fyrstu virðirløn, umframt einum veðri, sum eini seyðamaðurin, Torlakk Hansen, eigur.